# HVUSSU SKRIVAR MAN EINA KRIMI?

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**FORTREYTIN** FYRI AT GERAST EIN GÓÐUR **HØVUNDUR** ER, AT TÚ LESUR OG LESUR OG **LESUR**, OG AT TÚ ORKAR AT SITA OG **SKRIVA** Í HUNDRAÐTALS TÍMAR. HETTA SIGUR **KENDASTI** FØROYSKI KRIMIHØVUNDURIN, **JÓGVAN ISAKSEN**. LES **FYRILESTURIN** UM, HVUSSU MAN SKRIVAR EINA **KRIMI**

Higartil havi eg skrivað 10 krimibøkur. Seks um Hannis Martinsson, tvær til ung, eina dukkukrimi til børn og so eina útvarpskrimi. Men hvussu mann nágreiniliga skrivar eina krimi, haldi eg ikki, at eg havi nakra greiða fatan av.

Um eg fari aftur til mína fyrstu krimi, »Blíð er summarnátt á Føroyalandi«, sum bleiv skrivað í 1989-90, so var skrivingin merkt av sakloysi og spæli. Eg hevði fingið eina teldu, og øll sum eg kendi, ið høvdu teldur, fortaldu mær, at eg skuldi ansa mær, at tilfarið, ið kom inn á telduna ikki hvarv. Tí tað gjørdi tað javnan. Eg tordi tí ikki í fyrstani at skriva rættiligt tilfar inn á hetta tól – tvs. bókmentatilfar – men setti meg at spæla við telduni. Eg hevði frammandunan elektriska skrivimaskinu, og har hevði eg einaferð eina seina nátt skrivað nakrar fáar síður, har ein persónur situr og bíðar úti í Kastrup eftir flogfarinum til Føroya. Hesar fáu síður skrivaði eg nú inn á telduna.

Tey komandi kvøldini og út á náttina, tá ið eg var liðugur við mítt vanliga




starv, helt eg fram at skriva hesa søgu. Eg gjørdi mær eina varisligan synopsis, sum eg at kalla ikki fylgdi. Bara tað, at hendingarnar skuldu hava nakað við Annan veraldarbardaga at skaffa, helt eg fast um. At kalla øll onnur hugskot blivu broytt ávegis, sum bókin vaks.

Eg var komin heilt langt uttan av álvara at hava hugsað, at eg var í ferð við at skriva eina krimisøgu í føroyskum høpi. Fyribils var alt spæl, men samstundis hevur uttan iva krimisøgan hjá Einari Petersen »Deyðin sendir apríl« frá 1987 spøkt onkustaðni. Kundi Einar skriva ein krimisøgu á føroyskum, so kundi tað hent, at eg eisini megnaði tað. Men alt hetta var ikki medvitað.

## Bangin fyri at kopiera

Eg hevði í mong ár næstan á hvørjum ári lisið krimibøkurnar hjá Raymond Chandler, og tær eru eisini ein stórur íblástur til bøkurnar um Hannis Martinsson, men væl áleiðis í skrivingini bleiv eg bangin fyri, at eg skuldi kopiera hann. Eg tordi tí ikki at lesa Chandler, meðan eg skrivaði »Blíð er summarnátt«, og tað gingu fleiri ár, innan eg aftur fór at lesa hann. Aftur fyri las eg fitt av norska Gunnar Staalesen og danska Dan Turèll, tí har helt eg meg fáa inspiratión og um somu tíð helt eg, at vandin fyri eftirgerð ikki var so stórur.

Handritið bleiv liðugt móti sumri 1990, men hóast eg tá í eini fimtan ár hevði ummælt bókmentir, so dugdi eg als ikki at meta um mína egnu bók. Eg sendi tí handritið til pápa mín, tí hann hevði altíð lisið nógv, og hann skuldi nokk siga sína meining. Líkamikið hvønn vegin tað fór at verða. Hann meldaði aftur, at bókin var bara hampiliga spennandi, og at eg kundi geva hana út.

Síðani fekk eg Eivind Weyhe úti á Fróðskaparsetrinum at lesa rættlestur, og tað haldi eg var tað besta, eg kundi gera. Umframt at vera kønur í føroyskum máli, so las Eivind Weyhe í lestrarárunum rættlestur á bókunum hjá Berlingske Forlag, og teir høvdu eina røð av krimibókum, sum hann hevði lisið meginpartin av. So umframt at rætta stavivillur og gera uppskot til broytingar av hendinga setningum, so